EYSTURSKÚLIN TÓRSHAVN

# Lærarastarv í Eysturskúlanum

Eysturskúlin søkir eftir lærara í tíðaravmarkað starv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi at byrja 3. januar og skúlaárið út.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið

Talan er um eitt fulltíðarstarv við 25 undirvísingartímum um vikuna.

Viðkomandi skal undirvísa í 9. flokki í støddfrøði, føroyskt, enskt í 5. flokki. Í hesum starvi er neyðugt, at tú ert til reiðar at arbeiða í tøttum samstarvi í sjálvstýrandi toymið í 4. – 5. flokki. Ítróttur og evning eru eisini á tímatalvuni.

Starvið er lønt í lønarflokki 18.1 –27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið

**Í Eysturskúlanum leggja vit dent á:**
- Í undirvísingini at taka støði í teimum mongu førleikunum
- At leita eftir sterkum síðum hjá næminginum
- At tollyndi skal verða grundleggjandi fyri alt okkara virksemi

**Søkt verður eftir lærara sum:**
- hevur læraraútbúgving
- dugir væl at samstarva og samskifta
- áhaldandi vil menna seg sjálvan og skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar
- setir tollyndi í hásætið

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. desember

Meira fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við skúlastjóran, Eyðdis Eidesgaard á tlf. 302540 ella 214752.

**Eysturskúlin**
**Tórgarðsgøta 17**
**100 Tórshavn**

## Frá Vága Javnaðarfelag!

Aðalfundur og uppstillingarfundur verður í hølunum hjá Ingu Svabo **týskvøldið kl. 20.00**

***Vága Javnaðarfelag***

## Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Sosialurin 341800

VESTMANNA KOMMUNA

## GJÁARLON SØKIR EFTIR NÁMSFRØÐINGI OG AVLOYSARA

Søkt verður eftir námsfrøðingi og avloysara til dagstovnin Gjáarlon í Vestmanna at byrja 1. januar 2008.

**Vit sóknast eftir**
- 1 námsfrøðingi 20 tímar um vikuna. Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.
- 1 avloysara fyri hjálparfólk í farloyvi.

Starvið er tíðaravmarkað frá 1. januar 2008 til 1. januar 2009.

Starvið er ásett til 30 tímar um vikuna fram til summarfrítíðina; síðan 20 tímar um vikuna fram til 1. januar 2009

Dagstovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði – skipaður til íalt 84 børn.

Stovnurin letur upp kl. 7:15 og letur aftur kl. 17:15. Gjáarlon er ein grønur stovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið inni sum úti.

Umstøðurnar eru sera góðar bæði innan– og uttandura.

**Vit bjóða**
Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit stóran dent á trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum, og vit virka alsamt fyri at skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur. Gerðandisdagurin er somuleiðis merktur av, at vit eru ein grønur stovnur.

**Vit ynskja**
Vit leggja dent á, at tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt, ert ágrýtin og nýhugsandi. Tú tekur ábyrgd og virkar í góðum samstarvi við samstarvsfelagar og foreldur, og saman við okkum ert tú við til at menna tað námsfrøðiliga arbeiði. Vit vænta, at tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á telefon 230134 ella Solveig Olsen, varaleiðara, á telefon 230154.

**Umsókn og freist**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 14. desember, kl 12:00.

Setanarsamrøður verða í viku 51.

Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

Gjáarlon
Hornavegur 16
FO – 350 Vestmanna

Umsóknir skulu merkjast »Gjáarlon«.

**DAGSTOVNURIN GJÁARLON**

Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

# Sálarfrøðingur

Við hesum verður søkt eftir sálarfrøðingi til Blákrossheimið. Talan er um farloyvisstarv frá 01.01.2008-31.10.2008

Viðgerðin er er ein sálarfrøðilig og sosialpædagogisk viðgerð sum mest byggir á kognitiva broyting, skipað við bólkaarbeiði og staksamrøðum.

**Uppgávur/arbeiðsøki:**
- Ábyrgdina av viðgerðini á Blákrossheiminum
- Bólkaleiðari og staksamrøður við búfólk
- Ambulantar samrøður við misnýtarar og avvarðandi
- Supervisión av starvsfólkum

**Førleikar/eginleikar:**
- Tú ert útbúgvin sálarfrøðingur
- Tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- Tú ert álitisvekjandi og álítandi
- Tú ert fyrikomandi og hevur samstarvsvilja
- Tú vilt arbeiða samsvarandi blákrosshugsjónini

**Vit bjóða:**
- Góðar og positivar samstarvsfelagar
- Uttanhýsis supervisión
- Eitt spennandi tvørfakligt arbeiðsumhvørvi, har tú ert við til at tilrættaleggja arbeiði á heiminum. Møguleiki er fyri at menna teg fakliga.

**Løn/setanartreytir:**
Lønin verður ásett smb. sáttmála. millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelagið.

**Setan:**
1. januar 2008 ella skjótast gjørligt.

**Umsókn:**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknin saman við prógvum, viðmælum v.m. skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 17.des. kl 12:00, og skal sendast til

**Blákrossheimið**
Olga Magnussen, leiðari
Lynggøta 12
FO-100 Tórshavn

Setanarsamrøður eru ætlaðar í viku 51

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Olgu Magnussen, olga@blakross.fo, ella sálarfrøðingin Jegvan Bæk, jegvan@blakross.fo, á tlf. 315575

**Bláí Krossur Føroya,** Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 9,5 ársverk. Pláss er fyri 15 búfólkum. Bláí Krossur Føroya er ein kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.